## Vit mugu gera okkara

Møguleikarnir hjá danska fótbóltslandsliðnum at sleppa við til EM-endaspælið næsta summar eru mest sum burtur eftir tapið fyri Spania leygardagin. Ein lítil møguleiki er, at Danmark vinnur sínar tríggjar seinastu dystir, og Spania tapir sínar tveir dystir. - Møguleikin fyri at sleppa til endaspælið er sera lítil, men vit mugu gera okkara og vinna seinastu tríggjar dystirnar. Undur kunnu jú henda, sigur Morten Olsen, landsliðsvenjari við Ekstrablaðið



## Odd Grenland bunkraði sjálvsálit

Norska felagið Odd Grenland spældi um vikuskiftið venjingardyst í móti Herkules, sum spælir í lægri deild, og Odd Grenland vann dystin 6-2. Odd Grenland stríðist í botninum í norsku tippuliguni, og fyri tveimum vikum síðani setti felagið fyrrverandi KÍ-venjaran Ove Flindt-Bjerg í venjarastarvið. Hann hevur nú tríggjar dystir eftir at bjarga felagnum undan niðurflyting. Næsti dysturin verður avgerandi botndystur ímóti Start.

# Kortini mugu blandast av nýggjum í Ukreina

**Súni Olsen hevur leikbann, Fróði Benjaminssen skal verða pápi, Herbert í Lon Jacobsen er sjúkur, og Hans Pauli Samuelsen hevur mist hugin at spæla á landsliðnum. Tveir nýggir spælarar eru boðsendir til Ukreina**

LANDSLIÐIÐ
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Kiev, Ukraina: Undan dystinum móti Fraklandi leygardagin vóru fleiri avboð. Umframt avboðini frá Óla Johannesen og Marna Djurhuus, var Jákup á Borg skaddur – tað er hann framvegis – og Atli Danielsen leikbannaður.

Helst hevði landsliðsvenjarin gjørt onkrar smærri broytingar til dystin mikudagin, eftir stórtapið fyri fronsku heimsstjørnunum, men nú er greitt, at Jógvan Martin Olsen verður noyddur at gera fleiri broytingar á liðnum orsaka av avboðum av ymiskum slag.

### Profilar givið avboð

Súni Olsen, sum saman við Mikkjal Thomassen hevur mannað sentrala miðvøllin hjá Føroyum, er leikbannaður mikukvøldið og er tískil ikki tøkur.

Fróði Benjaminsen, ið er sæddur at yvirtaka leiklutin sum stýrimaður í verjuni eftir Óla Johannesen, kann gerast pápi fyrsta dagin og ynskir tí ikki at fara av landinum. Tí er hann heldur ikki við.

Harnæst legðist verjuleikarin Herbert í Lon Jacobsen sjúkur leygarkvøldið, og tí fekk hann ikki komið við til Ukraina, umframt at framrættaðimiðvallarleikarin Hans Pauli Samuelsen leygarkvøldið boðaði Jógvan Martin Olsen frá, at hann ikki ynskti at fara við til Ukraina.

### Atli, Tem og Hanus

Hetta er sjálvsagt ein keðilig støða hjá landsliðsvenjaranum, og tí hevur hann sent boð eftir øðrum fólki. Talan er um miðvallarleikararnar Tem Hansen og Hanus Thorleifsson. Eisini kemur tað væl við, at Atli Danielsen er tøkur aftur, eftir at hann sat yvir leygardagin.

Hesir tríggir vóru tó ikki partur av ferðalagnum til Ukraina sunnudagin, men komu til Kiev í dag.

### Trupul uppgáva

Henda útskifting í hópinum merkir við øðrum orðum, at Jógvan Martin Olsen aftur hevur eina trupla uppgávu, tá liðið skal setast mikudagin. Nýggjur miðverji skal finnast fyri Fróða Benjaminsen. Mest upplagda valið tykist vera Óli Hansen. Somuleiðis skal ein avloysari finnast fyri Súna Olsen. Her kundi Atli Danielsen verið eitt gott boð, tá hann í Frem er fastur fúsur á miðvøllinum, hóast vit á landsliðnum einamest kenna hann í leiklutinum sum høgri bakkur.

Annar møguleiki er at lata Atla spæla á høgra bakki og taka Christian Høgna Jacobsen longur fram á vøllin, men tá stendur spurningurin við sentrala miðvøllin framvegis ósvaraður. Og ósvaraðir sleppa hesir spurningar at standa til mikukvøldið, tá Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari, enn einaferð hevur blandað kortini av nýggjum.



*Liðfelagarnir Bergur Midjord og Jákup Mikkelsen smílandi meðan bíðað verður eftir viðførinum í Kiev. Aftanfyri teir Símun Samuelsen og uttast til høgru Óli Hansen, sum møguliga verður avloysarin hjá Fróði Benjaminsen í miðverjuni*
*Mynd: Rólant Waag Dam*

# Drúgvur túrur

**Næstan 18 tímar tók tað, frá at landsliðið kekkaði út av Hotel Føroyum, til teir vóru upp á pláss í Ukraina**

LANDSLIÐIÐ
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

**Kiev, Ukraina:** Túrurin úr Føroyum til Ukraina var ein av teimum drúgvaru. Klokkan var lítið meiri enn seks sunnumorgunin, tá spælararnir settust í bussin uttan fyri Hotel Føroyar, og hon var farin av midnátt, tá føroyski hópurin chekkaði inn á Hotel Natsionalny í ukrainska høvuðsstaðnum Kiev.

Men hóast drúgv var ferðin í allar aðrar mátar góð. Túrurin úr Føroyum til Kastrup gekk væl. Í Kastrup var steðgað í góðar fýra tímar, áðrenn kósin var sett móti München í Týsklandi, har eitt annað flogfar bíðaði eftir føroyska ferðalagnum. Á flogvøllinum í München varð runnið úr einum flogfarið í hitt, sum skuldi flúgva landsliðið til Ukraina. Men hóast tíðin var knøpp, komu allir mans umborð til tíðina.

So eftir stívliga seks tímar í luftini í trimum ymiskum flogførum, og smáar 12 tímar ferðing við buss og bíðitíð, kom føroyska ferðalagið loksins upp á pláss. Møðsamt var tað, men burtursæð frá eini lítlari seinking á 20 minuttir, tá farast skuldi úr München, gekk alt sum ætlað.

Drúgva ferðin hevur tó við sær, at ætlaða fyrrapartsvenjingin í dag varð tikin av skránni, soleiðis at leikararnir eru úthvíldir og klárir at tørna til, tá venjast skal seinnapartin.

Umframt sjálvt landsliðið og hjálparfólk, ið so ella so eru knýtt at tí, eru fýra umboð fyri føroysku fjølmiðlarnar við á ferðini í Ukraina.